

*Enn einaferð megnaði Gríma tað, sum sjónleikabólkurin hevur gjørt so ofta fyrr, nevniliga at gera ein sjónleik so viðkomandi fyri føroyingar. Vit síggja tilkomna mannin, sum ikki veit hvat hann vil, og vit síggja gomlu mammuna, sum bert hevur ein at styðja seg til, nevniliga dóttrina* *Anna V. Ellingsgaard*

Vakurleikadrotningin úr Leenane:

# Ikki so vøkur hóast alt

**Tað var vakurt, ógvusligt, seksuelt, harðligt, ørkymlandi, og nógv annað. Gríma hevði frumsýning av sjónleikinum "Vakurleikadrotningin úr Leenane" leygarkvøldið 20. mars. Sjónleikurin bar seg væl, og áskoðarin var altíð við, serliga tá seksualiteturin og tað ørkymlandi var uppi at venda. Nógvar stuttligar og vakrar løtur vóru, men tað álvarsama var væl blandað upp í vakurleikan**

SJÓNLEIKUR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*mikkels@fas.harvard.edu*

Tað var fultsett á Meiarínum leygarkvøldið, tá Gríma fyri aðru ferð framførdi sjónleik eftir Martin McDonagh. Hesin gitni rithøvundurin hevur nevniliga eisini skrivað "Krypilin úr Inishmaan," sum Gríma framførdi fyri fýra árum síðani.

Hetta leygarkvøldið var tað "Vakurleikadrotningin úr Leenane" hjá Martin McDonagh, sum skuldi sýnast fyri fyrstu ferð í Føroyum. Hesin leikurin er eisini spældur á Royal Court Theatre Upstairs í London og á Broadway, so tað er ein vælkendur leikur, sum Gríma aftur hesuferð hevur átikið sær at tulka. Tað er Egi Dam, sum er leikstjóri.

"Vakurleikadrotningin úr Leenane" er settur í fátæka Írlandi, í býnum Galway í einum køki, har bygdafólk mala í kring um seg sjálvan og onnur, meðan skálkabrøgd og lokabrøgd verða framd og goymd.

Høvuðsleikarin er Maureen (Ria Tórgarð), í 40'unum og jomfrú, sum stríðist úti í tí dagliga bert fyri at koma heim til eina illgongda og illorðaða mammu (Laura Joensen), ið elvir til meira frustratión og tunglyndi hjá Maureen. Maureen er nevniliga skirvislig og hevur verið innløgd á stovni, nakað sum sjónleikarin Ria Tórgarð fær fram í lítlum nuansum, og sum vísir Maureen sum eina konu sum altíð er á greinsuni sálarliga. Ria Tórgarð megnar harumframt í Maureen at vísa eina kensluborna kvinnu, langtandi eftir kærleika og nærleika, men sum eisini forbannar seg yvir mammuna.

## Piss í vaskið

Orðini fella hart millum møðgurnar í køkinum, og mamman dugir væl at draga fyrimun av veiku dóttrini. Laura Joensen megnar at vísa allar síður av hesum trupla mammufigurinum, sum til tíðir er sjálvsøkin, óndur, keddur, manipulerandi, og aðrar tíðir tømir land í køksvaskið. Tað er dialogurin og góða samanspælið millum tær báðar (Riu Tórgarð og Lauru Joensen), sum ber sjónleikin fram.

Tann vanliga dagliga gongdin hjá Maureen og mammuni verður bert avbrotin av Ray (Hans Tórgarð), sum elskar tær australsku og amerikansku sápu-seriurnar, serliga "Neighbours." Ray ivast í, hvat hann vil, men í øllum førum vil hann sleppa vekk frá Írlandi. Hann kemur inn til Maureen og mammuna av og á, tá hann hevur onkur ørindi har, smærri ella størri. Hans Tórgarð spælir sannførandi, og hann vísir Ray sum ein ótolnan mann, sum ikki veit hvar hann er í lívinum, men sum vil hava tingini ordnaði beinanvegin, so hann kann sleppa heim til sjónvarpið og "Neighbours."

Tað er Ray, sum kemur við boðunum, at eldri beiggi hansara Pato (Kári Øster) fer til Amerika, og at hann fer at halda veitslu, áðrenn hann fer yvirum sjógvin. Maureen fer til veitsluna og tekur Pato við sær heim, nakað sum mammuni ikki dámar væl. Nógv hørð orð fella millum møðgurnar um Pato og Maureen og um nøringina, og ávísir kropspartar verða nevndir til at stuðla undir keglið millum tær báðar.

Seksualiteturin er tíðum í hásæti, og Ria Tórgarð og Laura Joensen geva áskoðarunum virði fyri pengarnar, tá tær skeldast aftur og fram um hvør hevur loyvi til hvat, og hvussu tingini áttu at verið gjørd.

## Hvussu vøkur er Vakurleikadrotningin?

Pato keglast ikki so nógv, men kallar Maureen "Vakurleikadrotningin úr Leenane." Pato er róligur og fittur maður, og hann er einasta ljósið í lívinum hjá Maureen, sum ígjøgnum Pato sær møguleikan fyri at fáa eitt betri lív onkra aðrastaðni uttan mammuna. Tað er Kári Øster, sum fær lív í henda stillisliga, men framsøkna mann, sum eisini vil tað besta fyri Maureen.

Ímóti endanum av sjónleikinum verða tær stóru avgerðirnar tiknar, og áskoðarin situr eftir við eini kenslu av forloysing, men ikki endaligari forloysing. Endin er alt tað, sum hetta ummælið byrjaði við: pent, ógvusligt, seksuelt, harðligt, ørkymlandi, og nógv annað. Áskoðarin ivast í, hvussu vøkur Vakurleikadrotningin úr Leenane hóast alt er. Men menniskjalig er hon, tað ivast vit ikki í, meðan vit ganga úr Meiarínum eftir sjónleikin.

"Vakurleikadrotningin úr Leenane" snýr seg um dreymar, sum ikki eru uppfyltir. Helst øll fólk kenna seg aftur í hesum sjónleikinum, sum vísir mannaættina frá síni bestu, men eisini ljótastu síðu. Sjónleikurin er eisini um vón í einum umhvørvi, har fólk mala um onnur fólk í vónini um, at tað verða tey, sum fara at gera tað stóra hálið í lívinum.

Enn einaferð megnaði Gríma tað, sum sjónleikabólkurin hevur gjørt so ofta fyrr, nevniliga at gera ein sjónleik so viðkomandi fyri føroyingar. Vit síggja tilkomna mannin, sum ikki veit hvat hann vil, og vit síggja gomlu mammuna, sum bert hevur ein at styðja seg til, nevniliga dóttrina. Og at enda er tað maðurin, sum fór út í stóru verð, men sum vildi hava tann góða partin av heimlandinum við.

So far tær ein tur oman á Meiaríið og hygg eftir onkrum, sum ikki er so langt frá tí, sum vit síggja í Føroyum hvønn dag. Og hugsa so fyri tær sjálvum, um tú ikki hevur sæð hetta onkustaðni fyrr í tínum egna lívi.

### Fakta um sjónleikin

Týtt og leikstjórnað: Egi Dam
Maureen: Ria Tórgarð
Mamman Mag: Laura Joensen
Pato: Kári Øster
Ray: Hans Tórgarð
Leikrit: Martin McDonagh
Frumsýning: 20. mars 2004



# Føroyskt fyri øll

**Vit hava øll skyldu til at vanda okkum um og verja føroyska málið. Tí høvdu vit øll, ikki minst fjølmiðlarnir, havt gleði av einum yvirskipaðum føroyskum málpolitikki, segði Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, millum annað, tá hann setti Málráðstevnuna í Norðurlandahúsinum fríggjadagin**



*Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, setti stevnuna*

MÁLRÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*
*Myndir: Maria Olsen*

Klingran í Norðurlandahúsinum var fullsett, tá málráðstevnan, sum Føroyska málnevndin og Móðurmálslærarafelag Føroya skipaðu fyri, byrjaði fríggjamorgunin. Ætlanin við málráðstevnuni var at viðgera støðuna hjá føroyska málinum í samfelagnum í dag. Eitt endamál við stevnuni var at fáa kjak í lag, um vit eiga at fara undir at orða ein almennan føroyskan málpolitikk.

Í setanarrøðuni vísti Jógvan á Lakjuni á, at í eini tíð, har smámál, sum føroyskt, verða kroyst allastaðni frá, er neyðugt at vera á varðhaldi. Hinvegin skal málið framhaldandi vera ein livandi vera, ið mennist, so tað ikki verður eitt fornminni. Hvussu vit finna eina slíka javnvág, er ein tann størsta avbjóðingin hjá teimum, ið fáa litið upp í hendi at orða ein almennan føroyskan málpolitikk.

## Svenskur málpolitikkur

Bjørn Melander, lektari við Institutionen för nordiska språk á Uppsala Universitet, er ein av teimum, ið hevur tikið av eini slíkari avbjóðing. Fyrilesturin hjá Melander snúði seg um eina verkætlan, ið hevur havt til endamál at kanna støðuna hjá svenska málinum, serliga í mun til støðugu ávirkanina frá enskum. Grundað á kanningina, hevði arbeiðsbólkurin orðað eitt álit, ið síðani varð nýtt sum grundalag fyri einum almennum málpolitikki.

Melander vísti á, hvussu málsligt trýst útifrá kann gerast ein innanhýsis mentanarligur trupulleiki. Á alsamt fleiri hægri útbúgvingum eru bæði frálærutilfar og fyrilestrar bert á enskum. Hetta ávirkar eisini tær lægru útbúgvingarnar, ið vilja fyrireika næmingarnar til hægri lestur, við at lata teir møta enskum fakmáli so tíðliga, sum til ber. Úrslitið er, at svenskt fakmál steðgar at mennast ofta longu á fólkaskúlastøði, tá enskt tekur yvir.

Ein álvarslig avleiðing av hesi gongd er, at nýggj vitan ongantíð nær út til almenningin, tí málið er vorðið ein ov stór forðing. Vit kunnu til dømis ímynda okkum eina støðu, har ein lækni ikki fær greitt sjúklinginum frá, hvat hann feilar, tí tað snøgt sagt ikki finnast svensk orð fyri tí, segði Melander.

Svenska álitið skýtir upp nøkur heilt ítøkilig átøk, ið kunnu verða við til at venda gongdini.

Millum annað at hægri útbúgvingarstovnar skipa fyri skeiðum í vísundaligum samskifti, at arbeitt verður við javnsettari nýtslu av svenskum og enskum, at málsligur førleiki verður partur av endamálsorðingini í teimum einstøku lærugreinunum umframt at granska verður í avleiðingunum av at útbúgva fólk á enskum.

## Mail ella teldubræv

Fyrilesturin hjá Jógvani í Lon Jacobsen bygdi eisini á eina kanning av hugburðinum til enskt. Hesuferð hugburðin hjá føroyingum til ensk tøkuorð í føroyskum. Eitt av orðapørunum, fólk skuldu taka støðu til, var mail ella teldubræv.Tey spurdu vóru býtt upp í bólkar eftir aldri, kyni, inntøku, útbúgving og øki. Í eini fyribils niðurstøðu staðfesti Jógvan, at tey yngru brúka mest mail, og at tey sjálvsagt gerast eldri. Alsamt fleiri fáa sær langa útbúgving og tess longri útbúgving, tess størri lyndi til at brúka ensk orð. Fleiri og fleiri hava teldu, sum eisini dregur enskan málburð við sær. Hægri útbúgving merkir ofta hægri inntøku, og tey við høgari inntøku brúka oftari ensk orð.

Sostatt er tað nógv, ið bendir á, at orðið teldubræv er á veg út úr málinum. Er tað rætt, boðar tað kanska frá einum meir liberalum hugburði til føroyska málrøkt sum heild. Hinvegin kann tað eisini hugsast, at mail er eitt aldurstreytað orð, sum tey ungu gevast við at brúka, tá tey gerast eldri.

Kanningin hjá Jógvani vísti nógv, og nógv av úrslitunum vóru rættiliga forvitnislig. Men hvørt mail ella teldubræv fer at vinna, kann bara framtíðin vísa, minti Jógvan á.

## Hvør dugir føroyskt?

Hólmgongan millum Karin Jóhonnu Knudsen og Jóannes Skaale legði upp til at gerast rættiliga viðkomandi fyri tey flestu, tá Karin Jóhanna legði soleiðis út:

»Man hoyrir dagliga, at børnini duga ikki føroyskt, tey ungu, foreldrini, pedagogarnir, politikkarnir, fjølmiðlarnir duga heldur ikki føroyskt, og nú begynnir man enntá at snakka um, at lærarnir duga ikki føroyskt. So er tað, eg spyrji meg sjálva, hvør er nú eftir, sum dugir føroyskt?«

Karin Jóhanna helt fram við at vísa á, at tá vit finnast at málburðinum hjá øðrum, finnast vit samstundis at teirra umhvørvi og teirra samleika. Tað ber ikki til at smoyggja ein málpolitikk yvir høvdið á einum fólki, sum ikki vil tað, ella sum ikki er í tráð við tey ynski og tann tørv, fólkið hevur. Málpolitikkur snýr seg eisini um valdsbýti millum fólk, og ansa vit ikki eftir, kann ein illa umhugsaður málpolitikkur brúkast sum vápn at kúga aðrar samfelagsbólkar við.

Jóannes Skaale skilti eftir øllum at døma Karin Jóhonnu sum, at vit eiga at sleppa at gera við málið, sum okkum lystir. Síðani nýtti hann høvið at brúka fjølmiðlarnar sum ræðudømi um málnýtslu, sum kann fara so langt av leið, at tíðindini verða beinleiðis ósonn. Dømini vóru mong, og nógv vóru undirhaldandi. Men eg helt meg hava hoyrt tey flestu av teimum fyrr, ofta sum skemtisøgur í øðrum høpi. Annars samanbar hann vánaliga málnýtslu við umhvørvisdálking, sum alt ov nógv fólk eru vorðin fullkomiliga líkaglað við.

Jóannes helt, at fjølmiðlarnir javnan áttu at havt innanhýsis fundir, har tíðindastubbar frá vikuni vórðu tiknir fram, og starvsfólkið soleiðis kundi leiðabeina hvønnannan málsliga, har tørvur var á tí.

Hólmgongan millum Karin Jóhonnu og Jóannes gjørdist ongantíð ein hólmgonga. Spell, ikki minst tí Karin Jóhanna ikki rættiliga fekk høvi at koma við sínum boði uppá, hvussu ein málpolitikkur, ið tekur fyrilit fyri samleika og umhvørvi, skal orðast.

## Ikki líkaglað

Turið Sigurðardóttur tók at enda samanum, har hon millum annað treiv í vandan fyri økismissi, sum formaðurin í Dansk Sprognævn, Niels Davidsen-Nielsen, eisini var inni á. Ansa vit ikki eftir, er vandi fyri at vit missa heil yrkisøki málsliga. Longu nú síggja vit, at tað eru yrkisøki, sum so at siga bert eru til á enskum, umframt at tað gerst alt meir vanligt, at enskt er arbeiðsmálið hjá fleiri fyritøkum.

Annars var breið semja um, at vit eiga at orða ein almennan málpolitikk. Hvussu hetta skal gerast var minni greitt. Endamálið við stevnuni var eisini fyrst at fáa eitt kjak í lag, og hóast ferð ongantíð rættiliga kom á kjakið, komu nógv áhugaverd sjónamið fram, sum um ikki annað prógvaðu, at føroyingar ikki eru líkaglaðir við føroyska málinum.





*Bjørn Melander, málfrøðingur úr Svøríki, og Niels Davidsen Nielsen, formaður í Dansk Sprognævn*



*Jóan Hendrik Winther Poulsen og Malla Dam sótu við pallborðið*